







# Anfinn var noyddur at steðga tjóðveldisflokkinum

**–Tjóðveldisflokkurin ætlaði at kollvelta eina skipan, sum ikki so frægt sum hevði fingið fótafestið og tað vildi eg ikki góðtaka, sigur Annfinn Kallsberg**

MIÐFYRISITINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sparingarnar, sum nú eru gjørdar í miðfyrisitingini hesuferð, eru ikki fyrstu royndirnar at minka um hendan partin av almenna virkseminum.

Eisini undanfarna samgongan gjørdi eina roynd at endurskoða miðfyrisitingina.

Men tann royndin fór fyri ein stóran part í vaskið.

Og tað hevði Anfinn Kallsberg, sum tá var løgmaður, skyldina av, segði Karsten Hansen í Sosialinum í gjár.

Karsten Hansen, sum tá var landsstýrismaður í fíggjarmálum, segði, at í 1998, kom tað í samgonguskjalið, at miðfyrisitingin skuldi endurskoðast.

– Vit ætlaðu at hava tað meiri tvørgangandi, men tað var nógv mótistøða móti tí í samgonguni, og løgmaður vildi ikki gjøgnumføra tað, segði Karsten Hansen.

Hann segði, at hann gjørdi eina ætlan, men hann fekk at vita frá løgmanni, at hann skuldi halda fingrarnar burtur.



*– Ætlanin hjá tjóðveldisflokkinum hevði flutt alt vald yvir til tey málsøki, sum hann sjálvur umsat og tað kundi eg als ikki góðtaka, sigur Anfinn Kallsberg*

## Kundi ikki góðtaka kollvelting

Hetta er bæði rætt og ikki, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur at tað er rætt, at undanfarna samgonga avtalaði at endurskoða miðfyrisitingina við tí fyri eyga at gera hana bíligari.

– Men, tað, sum tjóðveldisflokkurin borðreiddi við, var onki minni enn ein ætlan um at kollvelta alla miðfyrisitingina.

– Og tað kundi eg ikki góðtaka

– Vit høvdu akkurát fingið nýggja stýrisskipan og miðfyrisitingin var ikki liðugt útbygt til tað nýggju stýrisskipanina.

– Tí vildi eg heldur ikki góðtaka, at fyrisitingin varð fullkomiliga umskipað, longu áðrenn hon varð fingin at virka eftir ætlan í sambandi við nýggju stýrisskipanina.

Anfinn Kallsberg helt sostatt ikki, at miðfyrisitingin longu tá var búgvin til so stóra kollvelting, longu áðrenn hon var liðugt útbygt.

## Styrkja seg

Anfinn Kallsberg sigur, at tað sum tjóðveldisflokkurin ætlaði, var at seta allar fíggjarfrøðingarnar hjá landinum í Fíggjarmálaráðið og allar løgfrøðingarnar í Løgmálaráðið.

– Hetta vóru tey málsøkini, sum tjóðveldisflokkurin sjálvur umsat. Sostatt skuldi teir hava allar serfrøðingarnar undir sær,

Anfinn Kallsberg sigur, at tað hevði fullkomiliga máað støðið undan miðfyrisitingini

Hann heldur eisini, at tað hevði broytt javnvágina í landsstýrinum munandi og hevði flutt alt ov stórt vald yvir til tjóðveldisflokkin.

– So kundu øll hini bara farið til hús, sigur hann.

Anfinn Kallsberg sigur, at hann uppfataði hetta eisini sum eina roynd hjá tjóðveldisflokkurin at styrkja sína egnu støðu í landsstýrinum og at gera øll hini landstýrisfólkini veikari.

Tað var eisini ein orsøk til at hann steðgaði ætlanini, tí tað kundi hann sjálvsagt ikki góðtaka og tí steðgaði hann ætlanini.

# Nú kemur tann stóra avbjóðingin

**– Vit kunnu ikki bara skerja miðfyrisitingina og so seta okkum hendur í favn. Tá ið sparingarnar eru gjørdar, er tann størsta avbjóðingin eftir, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini**

MIÐFYRISITINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Sum støðan er nú, er miðfyrisitingin hjá landsstýrinum ikki yvirmannað.

Tað heldur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjanevndini.

Nógv kjak hevur verið um miðfyrisitingina síðani landsstýrið gjørdi av at skerja hana 10% yvir ein kamb.

Men Anfinn Kallsberg ávarar ímóti at lata hesar sparingar standa einsamallar.

– Vit kunnu ikki skerja miðfyrisitingina og so seta okum hendur í favn. Tá ið skerjingarnar eru gjørdar, er nevniliga tann størsta avbjóðingin eftir. Og tað er at laga føroyskt lógarsmíð til føroysk viðurskifti, so tað ber til hjá fyrisitingini at virka.



*– Sum støðan er nú, er miðfyrisitingin ikki ov stór. Verður hon minkað, mugu eisini onnur tiltøk setast í verk fyri at hon kann virka, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini*

Anfinn Kallsberg sigur, at tað er onki løgið í at miðfyrisitingin er nógv vaksin, nú vit eru farin yvir til eina ráðharraskipan

– Men fyri tað um eg ikki góðtók ætlanina hjá tjóðveldisflokkinum, havi eg onki havt ímóti, at sparinginar verða gjørdar í fyrisitingini, eitt nú at fáa dupultfunktiónir burtur. Og í nøkur ár er spart á játtanini til miðfyrisitingina.

Samstundis vórðu tveir serfrøðingar í rationalisering settur í starv at finna sparingarmøguleikar, eitt nú við at leggja funktiónir saman.

Anfinn Kallsberg vísur tó á, at tað, sum er hent við miðfyrisitingini er ikki annað, enn at hon er minkað í vavi.

– Tað fer aftur at seta enn størri krøv til effektiviseringar, eitt nú at leggja funktiónir saman.

## Nú kemur stóra avbjóðingin

Anfinn Kallsberg heldur annars ikki, at miðfyrisitingin er ov stór, soleiðis sum støðan er nú.

– Og hann heldur avgjørt, at tær sparingarnar, sum eru gjørdar, kunnu ikki standa einsamallar.

– Tá ið sparingar verða gjørdar, er tann heilt stóra avbjóðingin eftir og tað er at laga lógarverkið til føroysk viðurskifti.

– Sostatt verður tað neyðugt at gera lóggávuna einfaldari, Men higartil hava vit ongantíð havt okkum fyri eygað at gera lógir, sum eru hóskandi hjá einum lítlum samfelagi at umsita.

– Vit hava altíð havt til vana at týða danskar lógir til Føroyskt og seta tær í gildi her, uttan at hugsa um, at tær eru gjørdar til eitt samfelag, sum er 100 ferðir størri enn okkara. Ella hava vit beinleiðis sett danskar lógir í gildi í Føroyum.

– Sostatt eru lógir, sum krevja eina velduga fyrisiting, settar í gildi í einum landi við lítlari fyrisiting.

– Tí verður tað tann stóra avbjóðingin hjá okkum at laga lógarverkið til føroysk viðurskifti, so at tær eru til at umsita hjá einum lítlum samfelagi.

– Tá ið vit hava gjørt lóggávu í Føroyum, hava vit ongantíð hugsað um at gera tær nóg einfaldar og léttar at umsita hjá eini lítlari fyrisiting.

– Koma vit ikki hesum til lívs, kemur fyrisitingin í stórar trupulleikar, tí hon fer ikki at megna at umsita eftir lógini.

Hann nevnir dømi um fiskivinnulóggávuna, sum ætlanin nú er at endurskoð við tí í hyggju at gera lógina einfaldari og lættari at umsita.

Hann nevnir eisini, at í 1993 varð avtala gjørd við donsku stjórnina um at landsstýrið skuldi dagføra sosiallóggávuna.

– Hóast peningur er settur av til hetta endamál hvørt ár síðani, hava vit enn ikki megnað at halda hesa avtaluna, hóast heili 11 ár eru farin.

– Samstundis fyrisita vit á økjum, har vit kanska ikki eiga at fyrisita.

Hann vil tó ikki nevna dømi.

– Vit kunnu ikki steðga við tær sparingar, sum eru gjørdar. Tað verður avgerandi neyðugt at fara víðari og laga lóggávuna til føroysk viðurskifti.

– Og tað fer at krevja sera stóra orku, sigur Anfinn Kallsberg.